# Kirstin Strøm Bech 50 ár

Leygardagin 2. september fyllir Kirstin Strøm Bech 50 ár. Kirstin er uppvaksin og býr í Vági. Hon er dóttir Poulu f. Midjord og Sjúrð Strøm, sála.

Fyrstu árini búði familjan í Toftum hjá Kal-ommuni og síðani við Kráir hjá abbanum. Tá Kirstin var 6 ára gomul, flutti familjan í egin hús í Toftum.

Í Toftum var gott at vera óviti. Har vóru nógv skemtilig fólk, ið vóru góð við óvitarnar og góvu sær stundir at tosa og skemta við teir. Í Toftum var eisini staðið har nógvir óvitar savnaðust og spældu. Og so var tað tónleikurin. Tú hoyrdi, tá fólk lurtaðu eftir tónleikasendingum. Onkunstaðni vóru fólk, ið sungu eina vísu ella trivu í eitt kvæði ella tóku ein »swingom«. Hjá okkum var nakað heilt serligt, tí pabba spældi uppá harmoniku so at siga hvørt kvøld. Tað man vera hetta, ið gjørdi, at tónleikurin er so týðandi partur í lívi tínum og okkara.



Kirstin tók HF-prógv og fór síðani á Læraraskúlan. Hon gjørdist lærari í 1981. Hon var lærari í Tórshavnar Kommunuskúla í eitt ár, síðani í Hvalba til hon fekk starv í Porkeris Skúla, har hon hevur arbeitt síðani. Hon er ein góður og nærlagdur lærari og luttekur ofta á skeiðum fyri at endurnýggja sína vitan.

Kirstini dámar væl at skemta sær og at dansa. Hon hevur í nógv ár gingið til dans. Eisini dugir hon væl til hendurnar og er ein sonn listakona. Mangt plaggið, manga smúkku og mangan trælut hevur hon evnað til og givið okkum. Gávumildni er eisini hennara eyðkenni.

Kirstin skrivaði søgu, tá hon gjørdist fyrsti kvinnuligi borgarstjóri í Vági. At hon gjørdist politikari undrar okkum ikki. Tað hevur altíð verið tjakast um samfelagsmál í familjuni. Kirstin fekk í blóðið viljan og dirvið at stríðast fyri felagsskapin – fyri tey veiku og fyri tey smáu. Hon er sera hjálpsom, er altíð til reiðar at hjálpa, tá onkur treingir til eina hjálpandi hond. Tá á stendur, er Kirstin rólig, hugsar seg væl um og tímir ikki at fáast við klandur. Hon er jalig og dugir at lurta eftir øðrum. Hetta eru allir góðir eginleikar og ein fyritreyt fyri at vera ein góður borgarstjóri.

Kirstin er gift við Hans Jacob Bech, og tey eiga sonin Kenneth.

Góða Kirstin. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á fimmti ára degnum og ynskja tær nógv góð ár í framtíðini. Vit takka tær fyri mangar hugnaligar og skemtiligar løtur, bæði heima og á uttanlandsferðum. Takk fyri tað, tú ert fyri okkum øll.

**Systrarnar**

## Andlát og jarðarferðir

**Esther Kruse á Eiði** andaðist á Korndalsbýlinum 31. august, 89 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Eiðis kirkju sunnudagin 3. september kl. 15. Tey, ið vilja minnast Esther, kunnu lata eina gávu til Eiðis kirkju.

**Helga Weihe, Tórshavn**, fødd Nybo úr Hesti andaðist á Lágargarði hósdagin 31. august, 95 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni. Tey, ið vilja minnast Helgu kunnu lata Lágargarði ella Kirkjuni í Hesti eina peningagávu.

**Sanna Lisberg, í Vági**, andaðist á Frederikshavn Sjúkrahúsi mikudagin 30. august, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

# Formansskifti í Ferðslutrygd

**Í sambandi við formansskifti á Ráðnum fyri Ferðslutrygd var móttøka fyri innbodnum á Hotel Hafnia hósdagin. Høgni í Stórustovu hevur tikið við sum nýggjur formaður eftir Rúnu Sivertsen**

FERÐSLUTRYGD

Høgni í Stórustovu hevur tikið við sum nýggjur formaður í Ferðslutrygd eftir at Rúna Sivertsen, sum hevur verið formaður síðan apríl 2003, hevur sagt seg úr hesum álitissessi.

Høgni hevur verið nevndarlimur í Ferðslutrygd síðan 2000 og næstformaður síðan apríl í ár.

Undir móttøkuni á Hotel Hafnia segði Rúna Sivertsen, at tað var ikki nøkur lætt avgerð hjá sær at taka at fara frá sum formaður í Ferðslutrygd, tí ferðslutrygd var hennara hjartamál. Hon var heilt trygg við at Høgni í Stórustovu hevur loyst hana av í hesum týðandi starvi, og vónaði hon, at vit skjótt fáa eina landsvirkisætlan viðvíkjandi ferðslutrygdini í Føroyum.

Síðan segði nýggi formaðurin, Høgni í Stórustovu, nøkur orð og takkaði Rúnu fyri gott samstarv og tað arbeiði hon hevði gjørt ferðslutrygdini til frama. Sama gjørdu Jón Kragesteen, dagligur leiðari á Ferðslutrygd og Jákup N. Olsen, nevndarlimur í Ferðslutrygd.



*Høgni í Stórustovu (h.m.) hevur tikið við sum formaður í Ferðslutrygd eftir Rúnu Sivertsen, sum hevur sitið í hesum álitissessi síðan apríl 2003*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra mamma, vermamma, systir, omma og langomma okkara

**Helga H. H. Weihe**
Tórshavn, fødd Nybo úr Hesti

andaðist á Lágargarði hósdagin 31. august, 95 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna*
**Sólrun, Helgi og Hildigunn**

*Tey, ið vilja minnast Helgu við blómum ella kransi kunnu í staðin lata Lágargarði ella kirkjuni í Hesti eina peningagávu, konto í peningastovnunum*

---




# Tøkk

Hjartans tøkk øll, sum á ymiskan hátt, hjálptu til, komu at heilsa uppá meg og sendu heilsanir, á 80 ára føðingardegi mínum 22. juli 2006.

Serlig tøkk til míni børn við familju.

**Heilsan**
**Hans Petur Brekkstein**
**á Velbastað**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, omma og vermamma okkara

**Solveig Kjelnæs**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Takk til tykkum á B6, sum vóru so væl um hana seinastu tíðina.
Takk til Bjarna Bæk, prest, fyri troystarfull orð á Landssjúkrahúsinum og við jarðarferðina.
Takk til tykkum mongu, sum veittu okkum kærleiksfulla hjálp.
Takk fyri blómur, kransar og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til seinasta hvíldarstað hennara her á fold.

*Familjunna vegna*
**Monrad, Heri og Joan**